# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# ELBILUR FRÁ MONACO



Venturi Fetish er ein elektriskur sportbilur bilur, sum verður framleiddur í Monaco.

Franska sportbilaverksmiðjan Venturi Automobiles varð upprunaliga stovnað í 1984. Best kendi bilurin var Venturi Atlantique, sum varð gjørdur frá 1984 til 2000, tá verksmiðjan fór á húsagang.

Árið eftir, í 2001, varð verksmiðjan keypt av øðrum eigarum og framleiðslan flutt til Monaco, har Venturi Fetish elbilurin verður framleiddur.

Framleiddir verða einans 25 bilar um árið. Venturi Fetish, sum hevur 245 hk elmotor og lithium-ion battarí, koyrir 150 km upp á eina løðing og toppferðin er 160 km/t.



*Jan Van De Locht frá Würth við nýggju Hunter balanseringsmaskinuni*

# Framkomin balansumaskina

Dekksentrið við Falkavegin í Havn hevur fingið nýggjastu útgávuna av amerikansku Hunter maskinunum til balansering av hjólum á stórum akførum sum lastbilum og bussum.

Maskinan er sera framkomin og belastar hjólið, eins og tá tað rullar á koyribreytini, meðan tað verður balanserað. Hetta er tann fyrsta maskinan av sínum slagi og er hon enn ikki komin á danska marknaðin. Tað er Würth Føroyar, sum umboðar maskinurnar hjá Hunter Engineering Company.

Hósdagin 31. mars kl. 16.10

Í sendingini verður vitjað hjá Málarameistaranum Una Zachariasen í Havn, sum er ein málarafyritøka við fleiri starvsfólkum. Fyritøkan varð stovnað í Vestmanna í 1953 og flutti til høvuðsstaðin miðskeiðis í 90-unum. Samrøður eru við Una Zachariasen, Hanus Thorleifsson og Paula Olsen.



Uni Zachariasen

Hanus Thorleifsson

Pauli Olsen

Vinnu- & bílradio á Rás 2